ÍF-KÍ 2-1 (1-1):

# Nú hava fuglfirðingar marginalirnar við sær

**Bartal Eliasen, sum fleiri ferðir var í brennideplinum, skoraði ÍF sigursmálið so mikið seint, at klaksvíkingar so at siga ikki høvdu møguleika at svara aftur**

ÍF–KÍ
*Jóannes Hansen*

Hýrurin á heimamonnunum í Fuglafirði var góður leygardagin. Eftir tætt stríð, sum var stak undirhaldandi og í løtum væl spælt, hevði ÍF kneykað KÍ 2–1. Harvið fóru fuglfirðingar annað vikuskiftið á rað av heimavøllinum sum sigursharrar. Tað hava teir nógvu tey seinnu árini ikki verið vanir við, tá ið mótstøðan hevur verið úr bestu deildini.

Marginalirnir vóru við, og tað plagar at boða frá góðum. Sigursmálið skoraði Bartal Eliasen, tá ið tað restaðu fimm minuttir. KÍ royndi at svara aftur. ÍF liðformaðurin, Eyðolvur R. Petersen, sum við kanónfluktara við vinstra beini dygst undan steðginum hevði javnað til 1–1, sá gult fyri aðru ferð og harvið reytt, men Marek Vierbiczki sendi frísparkið úr átjan metrum og høgt yvir málinum.

Sigursmálið hjá Bartali var hegnisligt. Tað vóru onkrar ábendingar um, at KÍ síðstu løtuna skuldi trýsta fyri at fáa sigursmálið. Á veg í álop mistu teir eitt sindur aftanfyri miðstrikuna, og støðan endaði við frísparki til ÍF. Áki Petersen legði innfyri, og Bartal stútaði dygst inn við handara stólpanum.

Bartal hevði havt aðrar møguleikar. Tvær ferðir í 1. hálvleiki spældi Magni á Lakjuni, sum aftur hesa ferð var mest eyðsýndi álopsmaðurin av øllum, hann leysan innanfyri ikki sannførandi KÍ miðverjuna, sum hevði ilt við at finna røttu støðurnar og oftast tapti kapprenningina við mótstøðumenninar. Bartal royndi at slíta seg leysan, men Jákup bjargaði báðu ferðirnar.

Í 2. hálvleiki var tað tætt við, at Bartal stútaði horna í málið, og so er spurningurin, um vandamikli maðurin yvirhøvur átti at spælt síðstu stóru løtuna. Við nógvari ferð leyp hann eftir horna inn í kropsskinnið á Atla Danielsen, sum hevði tak á støðuni og skuldi við høvdinum beina bóltinum burtur. Atli lá flatur, og fleiri mundu halda ondini. Bartal hevði frammanundan tiltuskað sær gult kort, og dómarin hevði ivaleyst komið við ostaflísini, um sami maður ikki hevði sæð hana frammanundan. Tíbetur fyri fuglfirðingar fór dómarahondin ikki í lumman.

### Trupulleikar í báðum endum

KÍ hevði sínar møguleikar, og tað vóru eisini teir, sum fingu hol á. Eftir horna úr høgru smekkaði Niclas Niclasen til úr stuttari fjarstøðu. Verjuspælarin bjargaði á strikuni, men bólturin fór til Stig Aksnes, sum úr stuttari fjarstøðu smekkaði í kassan. Bara lítil løta var eftir til steðgin, og tað tóktist sum um KÍ undir hvíldini skuldi eiga týdningarmikla sinniliga yvirskotið. So var tað, at Eyðolvur R. Petersen fluktaði so væl, sum hann neyvan hevur gjørt áður, og harvið vóru tað fuglfirðingar, sum vóru serliga væl nøgdir, tá ið fyrra umfarið var liðugt.

Serliga í 1. hálvleiki gekk skjótt úr øðrum endanum og í hin. Atli Danielsen og Arnold Joensen høvdu góðar royndir, og tíðliga í 2. hálvleiki hevði Erling Fles risa møguleika eftir innlegg frá Stig Aksnes, men honum eydnaðist ikki at stýra bóltinum innanfyri málkarmin.

ÍF miðverjan var ikki sannførandi, men tað kom væl við hjá teimum, at tyngdin í álopspartinum hjá KÍ ikki var tann, sum hon var hjá heimaliðnum.



*Bartal Eliasen gjørdist enn einaferð dagsins maður í Fuglafirði. Hesaferð tá hann fimm minuttir fyri leiklok stútaði frísparksinnlegg í kassan*

## Fótbóltsfepur í Fuglafirði

Fótbóltslagið er betri í Fuglafirði, enn tað hevur verið í nógv ár. Tað sást og kennist á øllum brøgdum. Áskoðararnir vóru leygardagin væl fleiri, enn teir plagdu at vera, tá ið ÍF var í 2. deild. Úrslitini higartil í ár hava við sær, at tað ikki bara eru spælararnir, men eisini áskoðararnir, sum hava fingið sjálvsálit. Tað hoyrdist aftur, tí teir vóru væl mælskari, enn teir plaga at vera.

Leikskráin, sum árini í næstbestu deildini hevur verið fotokopierað, telist nú millum tær frægastu, og bæði lokalt og aðra staðni frá er eydnast at fáa lýsingar, sum eru við til at økja um inntøkurnar hjá felagnum.

Í ítróttarhúsinum er lív í. Har verður skipað fyri sølu av øllum tí, sum hoyrir fótbóltsdysti til, tað ber til at atkvøða um besta spælaran og at vinna, og so varð fram til steðgin leygardagin skipað fyri serligari lutaseðlasølu. Seðlasølu er ikki heilt rætt. Fyri 30 krónur fekst ein tennisbóltur. Meðan spælararnir hvíldu seg, var møguleiki at tveita tennisbóltin á vøllin. Tann, sum megnaði at tveita tennisbóltin nærri mittuni á vøllinum enn nakar annar, vann ein ferðaseðil til Keypmannahavnar frá Atlantsflog.

Ferðaseðilin fór hesa ferð til Klaksvíkar, men tað mundu teir í Fuglafirði ikki leggja so nógv í, tí teir fingu hálvfinaluplássið í sín lut.

**jh**

## Hava ikki verið steypalið

KÍ hevur verið meistari seytjan ferðir. Steypasigrarnir hjá klaksvíkingum eru nógv færri. KÍ var fyrstu ferð steypavinnari í 1966 og so aftur í 1967. Síðani hava teir vunnið Løgmanssteypið í 1990, 1994 og í 1999. Eftir tapið í Fuglafirði er greitt, at KÍ fer ikki at hátíðarhalda 100 ára dagin sum steypavinnari.

ÍF hevur ongantíð vunnið steypakappingina. Fuglfirðingar hava tvær ferðir verið í finaluni, og teir hava báðu ferðirnar tapt ímóti HB. Fyrra ferðin var í 1976. Tá fevndi finalan um tveir dystir. Í Fuglafirði vann HB 5–1, og í Gundadali var úrslitið 2–2. Seinna ferðin var í 1987, tá ið ÍF spældi í 2. deild. Úrslitið var 2–2, og tá ið spælt varð tvær ferðir eitt korter kom einki mál. So var neyðugt við nýggjum dysti, sum HB vann 3–0.

Í 1998 og í 2001 spældu ÍF og KÍ fjórðingsfinalur í Klaksvík. Fyrru ferðina vann KÍ 3–1, og seinnu ferðina vunnu klaksvíkingar 2–1. Leygardagin var fjórðingsfinalan í Fuglafirði, tí ÍF stóð seg betri í bólkaumfarinum, enn KÍ gjørdi.

**-jh**

### Fakta um dystin

ÍF–KÍ 2–1 (1–1)
0–1: Stig Edvin Aksnes 43.
1–1: Eyðolvur R. Petersen 45.
2–1: Bartal Eliasen 86.
Dómari: Birgir Sondum
ÍF: Kartin Joensen – Árni Petersen, Viggo Johannesen, Áki Petersen, Rúni Elttør – Eyðolvur R. Petersen, Roy Róin (Eyðun Ryggshamar, 64.), Hanus Eliasen (Bárður á Lakjuni, 72.), Fritleif í Lambanum – Magni á Lakjuni, Bartal Eliasen
Gult kort: Bartal Eliasen, Árni Petersen,
Reytt kort: Eyðolvur R. Petersen 90. (tvey gul)
KÍ: Jákup Mikkelsen – Jan Andreasen, Niclas Niclasen, Aleksander Djordjevic, Marek Vierczbicki – Arnhold Joensen, Jan Joensen, Atli Danielsen, Símun Joensen – Erling Fles, Stig Edvin Asknes (Leon Bjartalíð, 87.)
Gult kort: Marek Vierczbicki, Atli Danielsen



# Spenningurin størri enn nakrantíð

**Hóast FCK tapti í Herning, so eru teir framvegis eins væl fyri í DM kappingini, sum teir vóru undan vikuskiftinum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsáhugin í Danmark er størri, enn hann hevur verið í mong ár, og støðan á stigatalvuni, nú bara endaspurturin er eftir, fer uttan iva at hava við sær, at tað verður uppaftur størri gravgangur eftir at sleppa at síggja lykladystirnar næstu vikuna, enn tað framman undan hevur verið.

Hóskvøldið skulu FCK og Brøndby spæla í Parkini, og sunnudagin skulu Esbjerg, sum er oddalið, og FCK spæla í Esbjerg. Øll tey fjøruti túsund atgongumerkini til nýklassikaran í Parkini eru rivin burtur.

Hjá FCK tóktist tað leygardagin sum um, at teir høvdu tveitt møguleikan sjálvir at avgera burtur. Í Herning taptu teir 2–1. Talan var um fyrsta FCK tapið á útivølli í meiri enn eitt ár. Frank Kristensen stútaði til 1–0 eftir horna beinanvegin, men stjørnuskotið Jesper Bech, sum hesa ferð var miðvallari í vinstru, meðan Zuma og Álvaro vóru í álopinum, javnaði til 1–1. Tá ið FCK stríddist fyri at vinna, kiksaði Morten Bisgaard afturlegging, og so skoraði Mohamed Zidan FCM sigursmálið. Hetta var fjórði dysturin hjá FCM á nýggja stadion, og hetta var 10. málið hjá egyptiska spælaranum, sum hevur skorað allar fýra ferðirnar.

Sunnukvøldið var FCK aftur við í meistarakappingini. Oddaliðið Esbjerg hevði ikki megnað at fara frá hinum oddaliðunum. Teir taptu 4–1 í Århus. AGF fekk tvey mál fyrstu fimm minuttirnar. Nýggi íslendski álopsspælarin hjá AGF, Helgi Sigurðsson skoraði tvær ferðir.

Brøndby megnaði heldur ikki at gera sær dælt av, at hvørki av hinum oddaliðunum hevði fingið nakað burturúr. Á heimavølli megnaðu teir 1–1 ímóti OB, sum var væl meiri sannførandi, enn teir høvdu verið ímóti FCK í landskappingini og steypakappingini. Hjá OB og fyri spenningin kom tað væl við, at OB legði seg framum beinanvegin. Brøndby stríddist fyri at koma afuríaftur, og tað eydnaðist at javna í síðstu løtu. Málskjútti var Johan Absalonsen. Tað ljóðar rættuliga føroyskt, men enn hevur eingin funnið fram til, um ættarbondini eru til Viðareiðis og harvið føroyska landsliðið.

Viborg átti heimavøll ímóti AaB, sum fór til hús við 1–0 sigri. Á heimaliðnum vóru teir ikki blíðir við dómaran, sum tvær ferðir hevði víst teirra monnum reyða kortið. Báðu ferðirnar var tað fyri brot ímóti David Nielsen, ið sigst vera serfrøðingur í hesum.

### Botnurin lætti sær á

AB og Frem hava síðstu vikurnar verið mest sum dømd til niðurflyting. Sunnudagin fingu bæði liðini fulla úrtøku, og harvið er avgerðin um, hvør skal flyta niður, útsett í hvussu so er til hósdagin. AB vann 2–1 á heimavølli ímóti FCN, sum annars kom á odda. Frem vann 3–2 á heimavølli ímóti Herfølge, sum sísðtu løtuna minkaði um munin frá 3–0 og til 3–2.

AGF sigurin á oddaliðnum hevði við sær, at AGF er komið undan niðurflytingarvandanum. Tey bæði feløgini, sum saman við AB og Frem stríðast fyri at sleppa undan fallinum, eru júst FCN og Herfølge.

# Jann Ingi hevur fingið fótin fastan

**Hinir báðir føroyingarnir komu ikki á vøllin eftir steðgin, og vóru tískil ikki við, tá ið Fremad Amager skoraði tvey mál**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*



*Jann Inga Petersen*

Eftir at tað fyrsta partin av várinum hevur verið striltið hjá Jann Inga Petersen at vinna plássið á sentrala miðvøllinum, sum hann tóktist eiga síðsta heyst, so tykist tað nú at vera gloppið hjá honum. Sunnudagin var hann á vøllinum allar 90 minuttirnar, tá ið Fremad Amager hevði vitjan av FC Nordjylland og vann 2–1. Hetta var annar heimasigurin hjá Fremad Amager á rað.

Meiri striltið gongst hjá meiri framrættaðu føroysku spælarunum á Amager. Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum vóru millum teir fyrstu ellivu. Men teir komu ikki á vølllin, tá ið farið var undir seinna umfarið, og tað framvegis var málleyst. Lítla løtu seinni legði FCN seg framum eftir hornaspark, men tá ið 2. hálvleikur var fimm minuttir gamal, javnaði Thomas Myssing, sum var annar teirra, ið var innskiftur. Fram ímóti dystarenda skoraði Fremad Amager sigursmálið.

Hjá Johan B. Hansen og Horsens gekk tað ikki meiri enn passaligt. Á heimavølli var úrslitið ímóti Ølstykke 1–1, og tað varð ikki mett at vera nóg gott.

Oddaliðið Silkeborg, sum ikki hevði tapt í átjan landskappingardystum á rað, fór úr Nykøbing Falster við 2–0 tapi. Spenningurin um uppflytingina øktist. Randers vann 5–0 á heimavølli ímóti Skjold. Nú er Randers á triðja plássinum trý stig aftanfyri Horsens, sum er eitt stig aftanfyri Silkeborg. Tað eru sjey umfør eftir.

Í botninum vaks mótið hjá Vejle eitt vet. Teir vunnu 2–0 ímóti niðurflutta B1913. Men Vejle er framvegis niðanfyri strikuna. Teir hava 20 stig, og Fremad Amager hevur 24. Ímillum tey bæði Føroya liðini eru B93 og Brønshøj, sum bæði hava 21 stig. B93 tapti 2–1 á heimavølli ímóti Køge, og Brønshøj fekk 1–1 á heimavølli ímóti Fredericia. FC Aarhus, sum er næstniðast, tapti 4–1 á heimavølli ímóti Sønderjydske, sum hevur 46 stig og framvegis ein lítlan møguleika at flyta upp.

## Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Esbjerg | 29 | 17 - 8 - 4 | 63 | 34 | 29 | 59 |
| 2 | FCK (M) | 29 | 17 - 7 - 5 | 48 | 24 | 24 | 58 |
| 3 | Brøndby (S) | 29 | 17 - 7 - 5 | 48 | 25 | 23 | 58 |
| 4 | OB | 29 | 14 - 7 - 8 | 56 | 43 | 13 | 49 |
| 5 | AaB | 29 | 14 - 7 - 8 | 44 | 37 | 7 | 49 |
| 6 | FCM | 29 | 12 - 6 - 11 | 56 | 43 | 13 | 42 |
| 7 | Viborg | 29 | 10 - 8 - 11 | 42 | 37 | 5 | 38 |
| 8 | AGF | 29 | 10 - 3 - 16 | 41 | 57 | -16 | 33 |
| 9 | FC Nordsj. | 29 | 7 - 8 - 14 | 31 | 53 | -22 | 29 |
| 10 | Herfølge | 29 | 7 - 6 - 16 | 28 | 44 | -16 | 27 |
| 11 | Frem | 29 | 7 - 3 - 19 | 33 | 54 | -21 | 24 |
| 12 | AB | 29 | 6 - 2 - 21 | 25 | 64 | -39 | 20 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

## Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Silkeborg | 23 | 16 - 4 - 3 | 47 | 17 | 30 | 52 |
| 2 | AC Horsens | 23 | 16 - 3 - 4 | 40 | 15 | 25 | 51 |
| 3 | Randers FC | 23 | 15 - 3 - 5 | 61 | 35 | 26 | 48 |
| 4 | Sønderjyske E | 23 | 14 - 4 - 5 | 60 | 31 | 29 | 46 |
| 5 | Køge | 23 | 12 - 6 - 5 | 43 | 33 | 10 | 42 |
| 6 | Skjold | 23 | 11 - 4 - 8 | 45 | 39 | 6 | 37 |
| 7 | Nykøbing | 23 | 11 - 3 - 9 | 36 | 33 | 3 | 36 |
| 8 | Ølstykke | 23 | 10 - 3 - 10 | 47 | 42 | 5 | 33 |
| 9 | FC Nordjylland | 23 | 8 - 6 - 9 | 26 | 33 | -7 | 30 |
| 10 | Fredericia | 23 | 7 - 8 - 8 | 30 | 33 | -3 | 29 |
| 11 | Fremad Amager | 23 | 6 - 6 - 11 | 32 | 42 | -10 | 24 |
| 12 | B 93 | 23 | 5 - 6 - 12 | 31 | 41 | -10 | 21 |
| 13 | Brønshøj | 23 | 5 - 6 - 12 | 29 | 51 | -22 | 21 |
| 14 | Vejle | 23 | 5 - 5 - 13 | 30 | 46 | -16 | 20 |
| 15 | FC Aarhus | 23 | 4 - 3 - 16 | 22 | 53 | -31 | 15 |
| 16 | B 1913 | 23 | 1 - 6 - 16 | 15 | 50 | -35 | 9 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen,(Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Danska 2. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Dalum | 23 | 15 - 4 - 4 | 57 | 30 | 27 | 49 |
| 2 | HIK | 23 | 13 - 6 - 4 | 50 | 34 | 16 | 45 |
| 3 | Næstved | 23 | 13 - 5 - 5 | 51 | 24 | 27 | 44 |
| 4 | Holbæk | 23 | 11 - 6 - 6 | 46 | 33 | 13 | 39 |
| 5 | Kolding FC | 23 | 10 - 6 - 7 | 42 | 37 | 5 | 36 |
| 6 | Brabrand | 22 | 9 - 6 - 7 | 43 | 31 | 12 | 33 |
| 7 | B1909 | 23 | 10 - 3 - 10 | 43 | 38 | 5 | 33 |
| 8 | Slagelse | 23 | 9 - 5 - 9 | 40 | 35 | 5 | 32 |
| 9 | Jetsmark | 22 | 7 - 6 - 9 | 32 | 46 | -14 | 27 |
| 10 | Lyngby | 23 | 6 - 8 - 9 | 36 | 46 | -10 | 26 |
| 11 | Kalundborg | 23 | 6 - 7 - 10 | 47 | 52 | -5 | 25 |
| 12 | Glostrup | 23 | 7 - 4 - 12 | 36 | 48 | -12 | 25 |
| 13 | Skive | 23 | 7 - 3 - 13 | 41 | 46 | -5 | 24 |
| 14 | Hjørring | 23 | 7 - 3 - 13 | 29 | 61 | -32 | 24 |
| 15 | Holstebro | 23 | 6 - 5 - 12 | 39 | 51 | -12 | 23 |
| 16 | Hvidovre | 23 | 5 - 7 - 11 | 25 | 45 | -20 | 22 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)